LM-053/2022

Fylgiskjal 8

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 23. febr. 2023
Mál nr.: 22/18081
Málsviðgjørt: jd

Upprit um innkomnar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um grundvatn

Uppskot til løgtingslóg um grundvatn varð sent til hoyringar hjá Kommunufelagnum, Skráseting Føroya, Sumbiar kommunu, Sp/f Kirvi, Sp/f Nomi Water og P/F Føroya Bjór, umframt hjá stjórnarráðunum. Lógaruppskotið hevur harumframt verið til ummælis á heimasíðuni hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum og á almenna hoyringarportalinum hjá landsstýrinum í tíðarskeiðinum 24. januar-22. februar 2023.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Heilsumálaráðið hava ongar viðmerkingar til uppskotið. Skráseting Føroya tekur undir við uppskotinum.

Kommunufelagið vísir á, at kommunurnar søguliga hava átikið sær at veita borgarum og vinnu nóg mikið av dygdargóðum vatni, og at kommunurnar eisini hava borið útreiðslurnar av hesum. Víst verður á, at vatnveiting er so mikið grundleggjandi, at tá ið farið verður undir at skipa hetta tilfeingið er rættast, at alt vatn verður skipað, eisini omanávatn, og at kommunur eiga at hava greiðan framíhjárætt at brúka alt slag av vatni til kommunala vatnveiting. Samstundis verður víst á, at uppskotið hevur týdning fyri SEV og Fjarhitafelagið, tí hesi feløg hava virksemi, ið verður ávirkað av lógini.

Víst verður somuleiðis á, at Kommunufelagið als ikki kann taka undir við, at kommunurnar skulu biðja landið um loyvi at gagnnýta vatn í sínum øki, men at kommunur heldur skulu boða landinum frá teirri gagnnýtslu, sum fer fram í kommununi. Í framhaldi av hesum verður víst á, at landið eigur ikki at hava framíhjárætt fram um kommunurnar at gagnnýta grundvatnið, tó at felagið skilir, at tað almenna má hava rætt fram um privatar grundeigarar og vinnurekandi.

Í lógaruppskotinum verður ásett, at landsstýrismaðurin í kunngerð kann áseta gjald fyri bæði loyvisviðgerð og loyvisveiting. Kommunufelagið metir, at talan er um gjald fyri staðbundið tilfeingi, og at partur av hesi inntøku eigur at falla til avvarðandi kommunu.

Kommunufelagið vísir á, at landsstýrismaðurin fær heimild at veita loyvi til vinnuliga gagnnýtslu av grundvatni, og at eingi krøv eru um, at kommunurnar eisini skulu geva loyvi. Samstundis verður víst á, at ivi er um, hvørt verandi boringar eru fevndar av uppskotinum.

Í sambandi við ognartøkuheimild landsstýrisins vísir Kommunufelagið á, at heimildin eigur at verða víðkað til eisini at fevna um kommunur, og at ognartøkuheimildirnar verða javnsettar.

At enda vísir Kommunufelagið á, at tað er óheppið, at landsstýrismaðurin hevur heimild at gera av, at avgerðir, sum myndugleikin tekur, ikki kunnu kærast til annan myndugleika. Somuleiðis verður víst á, at revsiásetingin eigur at verða broytt soleiðis, at tað er revsivert at fara undir virksemi, fevnt av lógini, uttan loyvi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal til hetta viðmerkja, at grundvatnið er ráevni í undirgrundini og tí fólksins ogn. Landið hevur rættin at skipa økið, og hesin rættur verður ikki víðkaður til eisini at fevna um kommunur. Í hesum sambandi er kortini umráðandi at nevna, at ognartøkuheimildin er víðkað til eisini at fevna um kommunur, tí tað í stóran mun fara at vera kommunurnar, sum standa fyri at gagnnýta grundvatn.

Grundvatn er sum nevnt ráevni í undirgrundini og kann ikki sammetast við vatn úr erva. Ráðið viðurkennir, at tørvur kann vera á at skipa vatnveiting o.a. við lóg, men tað eigur ikki at verða fevnt av hesi lógini. Henda spurning eiga land og kommunur at viðgera nærri í felag.

Um gjaldið, sum verður tikið fyri loyvisviðgerð o.a., skal viðmerkjast, at einki forðar fyri, at partur av gjaldinum verður latið kommununum. Kommunurnar hava ella kunnu fáa ymsar uppgávur, tá grundvatn verður gagnnýtt, m.a. málsviðgerð, reinsing av brúktum vatni o.a., og tá kann vera viðkomandi at viðgera kostnaðin av hesum uppgávum. Í hesum sambandi er eisini viðkomandi at nevna, at hóast landsstýrismaðurin gevur loyvi at gagnnýta grundvatn, so er kommunan byggimyndugleiki á økinum og skal tí játta onnur viðkomandi loyvi.

Jarðfeingi skal eftir ætlan umsita lógina og við tí eisini loyvisveitingina, og í útgangsstøði kunnu avgerðir, sum Jarðfeingi tekur, kærast til landsstýrismannin ella, verður avgerð tikin um tað, til eina kærunevnd. Ætlanin er ikki at skerja kærumøguleikan.

At enda skal viðmerkjast, at uppskotið er broytt soleiðis, at eisini interkommunalir felagsskapir kunnu fáa loyvi at gagnnýta grundvatn, eins og revsingin er broytt til eisini at fevna um tey føri, har farið verður undir at gagnnýta grundvatn, áðrenn loyvi er fingið til tess.

Umhvørvismálaráðið tekur undir við uppskotinum, men mælir til at broyta ásetingarnar um revsing soleiðis, at brot á reglur, givnar við heimild í kunngerð, kunnu verða revsaðar við sekt. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur tikið hetta til eftirtektar og broytt uppskotið samsvarandi.

Umhvørvisstovan viðmerkir, at tað er umráðandi at gera vatngóðskukanningar. Hetta er tikið til eftirtektar og uppskotið broytt samsvarandi.

Umhvørvisstovan mælir til at allýsa vatn við pH-virði, heldur enn sum grundvatn og omanávatn. Til hetta skal viðmerkjast, at hildið verður fast við verandi allýsing, tí mett verður rættari at brúka eina jarðfrøðiliga allýsing av grundvatninum.

Umhvørvisstovan vísir á, at mannagongdir í lóg og kunngerð um jarðhitaboringar verja grundvatnið fyri dálking, og at jarðhitaboringar tí ikki eru at meta sum inntriv, sum kunnu dálka grundvatnið. Til hetta skal viðmerkjast, at mett verður ikki, at galdandi reglur um jarðhitaboringar á nóg góðan hátt verja grundvatn fyri dálking. Hildið verður tí fast við verandi áseting um, at jarðhitaboringar eru inntriv, sum kunnu dálka.

--

Aftur at omanfyrinevndu hoyringarsvarum hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið fingið viðmerkingar frá borgarum, sum í dag annaðhvørt brúka grundvatn í sínum húsarhaldi ella sum á annan hátt eru ella verða ávirkað av lógini. Spurt verður m.a. um, hvussu verandi brúk verður ávirkað av lógini, og hvussu tryggjað verður, at borgarar ikki eru fyri tilvildarligum myndugleikaavgerðum, tá um grundvatn ræður, t.d. í mun til ognartøku.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur yvirskipað hesar viðmerkingar:

Landið hevur heimild at skipa gagnnýtslu av grundvatni, tí grundvatnið er ráevni í undirgrundini, sbr. omanfyri.

Hetta er staðfest í lov om efterforskning og indvinding af råstoffer i kongeriget Danmark frá 1950. At landið hevur hesa heimild, er eisini staðfest í bæði Føroya Rætti og Eystara landsrætti, har staðfest varð, at landið eigur grundvatnið og tí eisini rættin at gagnnýta vatnið í sumbiarbergholinum.

Í nevndu rættarmálum varð m.a. ført fram, at vatn hevur verið gagnnýtt privat í Danmark síðani 23. februar 1932, og at vatnið tí ikki er ogn hjá statinum, men hjá honum, ið gagnnýtir vatnið. Víðari varð ført fram, at av tí at 1950-lógin er galdandi fyri bæði Danmark og Føroyar, so mátti tað sama viðvíkjandi gagnnýtslu eisini vera galdandi: Tann, sum eigur lendið, eigur vatnið. Eystari landsrættur vísti hesum burtur við teirri viðmerking, at hóast eitt ráevni, sum er fevnt av ráevnislógini, er brúkt privat í einum parti av ríkinum (Danmark), so hevur tað ikki við sær, at ognarrætturin verður fluttur frá tí almenna til tað privata í einum øðrum parti av ríkinum (Føroyar), tí vatn í føroysku undirgrundini er ikki gagnnýtt privat áðrenn 23. februar 1932.

Samanumtikið verður tí mett, at landið – við sínum rætti at skipa gagnnýtsluna av grundvatni – eisini hevur rætt til at áseta, at reglurnar galda fyri gagnnýtslu, sum er byrjað áðrenn lógini fær gildi.

Um vandan fyri tilvildarligum myndugleikaavgerðum skal viðmerkjast, at tað júst er á økjum, ið vanta hóskandi lóggávu, at avgerðirnar kunnu gerast tilvildarligar og ymiskar. Umráðandi er tí at løgskipa økið soleiðis, at allir borgarar, eins væl og kommunur og vinna, vita, hvat er galdandi.

Um heimildina at ognartaka skal stutt viðmerkjast, at ognartøka kann bara fremjast, um tað er neyðugt til almannagagnlig endamál og bara móti fullum endurgjaldi. Landið fremur ognartøkuna við heimild í lóg, og endurgjaldsspurningurin verður avgreiddur við samráðing ella í rættinum.

Jóanna Djurhuus, ráðgevi